## DAGSINS MEINING

# Okkar fordómar

Vit føroyingar liva trygt her í landinum, uttan at gáa alt ov nógv eftir hvat hendir kring okkum. Útheimurin er útheimurin, og hann er ikki heima hjá okkum. Tað sum hendir í útheiminum hendir í útheiminum, og er so evindaliga fjart frá okkara egna trygga og hugnaliga gerandisdegi.

Ikki soleiðis, at vit onga meininga hava um hendingarnar úti í heimi. Vit hava gjørt okkum meiningar, ofta ávirkað av teimum, ið hava uppalt okkum, uttan sjálvi kanska at hava sett okkum inn í tingini. Og hesar meiningar eru ofta meira stýrdar av fordómum enn nakað annað. Tað er ikki óvanligt at hoyra í Føroyum niðurstøður sum hesar: Soleiðis eru norðmenn, soleiðis eru týskarar, soleiðis eru arabarar.

Soleiðis eru arabarar? Hendan setning kunnu flestu føroyingar taka undir við, hóast tey fægstu av okkum hava staðið andlit til andlit við ein arabara. Neyvan millum nøkur fólkasløg verður málað so svart og hvítt, sum millum arabarar og jødar og vesturheimurin tekur fuld undir við jødunum, har okkara kristindómur er sprottin úr. Tað er so gjøgnumseyrgað í vesturheiminum í dag, at arabarar eru annar klassi, meðan ísraelsmenn stríðast fyri sínum sjálvsagda rætti at búsetast aftur í landinum, teir mistu góð hundrað ár eftir Jesu deyða, at ongin dittar sær at seta spurningin, um rætturin er sjálvsagdur, og ongin torir rættuliga at hava eina hugsan um avleiðingarnar av hesum sjálvsagda rætti. Og vit eru ósek í at hugsa soleiðis, tí soleiðis eru vit uppald líka síðan krossferðirnar, tá víðgongd kristin, eins og útlendsku stuðlarnir hjá Bin Laden í dag stríðast í Afghanistan, fóru til Palestina at verja heilaga landið.

Seinastu dagarnar hevur verið rættuligt kríggj millum Ísrael og Palestinar. Tað byrjaði við eini palestnentiskari sjálvmorðsbumbu, ið kravdi 27 mannalív og síðan regnaðu missilar frá ísraelskum flogførum og tyrlum yvir báðar palestinensisku landspartarnar. Mikudagin doyði aftur ein palestini fyri egnari hond uttanfyri eitt hotel í Jerusalem. Hann hevði eina bumbu uppi á sær. Ætlanin var at beina fyri tveimum ísraelskum ráðharrum. Kenda bretska sjónvarpsstøðin BBC vitjaði familjuna hjá hesum manni beint aftaná. Familjan var skelkað. Tey vistu einki um, at maðurin var virkin í Hamas. Hann var farin frá húsum um náttina. Hevði sagt konuni farvæl, biðið hana ansa væl eftir soninum og síðan var hann horvin. Familjan var errin av honum hóast sorgina og harmaðist, at honum ikki var eydnast at fáa fleiri við sær í grøvina. Hetta er teirra trúgv eins og kristna trúgvin hevur terroriserað ørvísi hugsandi í mong hundraðtals ár.

Og vit føroyingar sita heima í okkara tryggu stovum og hyggja eftir, vit kunnu ikki annað. Eina hevndaratsóknin verður avloyst av tí næstu og tað er ringt at skilja í millum, hvør er gavstrikkurin og hvør er hetjan. Vit kunnu velja av gomlum vana at halda við tí vit altíð hava hildið við, ella vit kunnu gera okkum eina sjálvstøðuga meining um trupulleikan. Ella sum bretski forsætisráðharrin Tony Blaire segði herfyri. Einaferð mugu partarnir sessast og tosa saman, annars verður ikki friður. Og til tann løtan er komin, verður hildið fram við harðskapinum og eyðmýkingini frá báðum pørtum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ferðasambandið til og úr Suðuroy

**Nær fáa suðringar ágóðan av broyttari ferðaætlan?**

**Finnleif Guttesen**



Tvøroyrar kommuna heitti í juli 2001 á landsstýrismannin í vinnumálum um, at søkja um økta játtan á fíggjarlógini til suðuroyarleiðini so at títtleikin hjá Smyrli kundi økjast og verða galdandi alt ári.

Hendan áheitan kom, tí núverandi ferðaætlanin hevur tað við sær, at suðringar brúka alt ov nógva óneyuðuga bíðitíð, 6-10 tímar, í Tórshavn fyri at sleppa suður aftur.

**Uppskot og svar**

Skoti var upp, at ferðaætlanin fyri fríggjadag var brúkilig við smærri broytingum og kundi brúkast allar verkadagar í vikuni. Skoti var eisini upp, at Smyril kundi silgt 3 ferðir aftur og fram ein dag í viku fyri at nøkta "sertørvin" hjá norðingum. Somuleiðis skilja vit ikki, at Tyrlan ikki kann brúkast meira á hesari farðleið.

Tvøroyrar kommuna fær svar 4 mánaðir eftir áheitanina og sagt verður at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at fylgja hesa áheitan og hevur skoti upp, at túratali verður økt við einum túri (t/r) týsdag, at galda frá 1. november 2001.

Somuleiðis verður sagt, at um játtan fast til endamálið á fíggjarlógini fyri 2002, er tað eisini ætlanin at túratali skal økjast í komandi ári, so Smyril kann sigla tveir túrar aftur og fram hvønn dag í vikuni.

**Broytingar**

Túrurin týsdag kom í gildi 27. november 2001, men tað sær út til at SL í ávísan mun hevur gloymt busskoyringina í hesum sambandi.

Túrurin leygardag kl. 0945 úr Tórshavn verður ikki sigldur frá 1. november. Er tað ikki nakar í landstýrinum ella á SL sum hevur tonkt uppá, at sjálvt um eingin fótbóltur er um veturin so er tað aðrar ítróttargreinir, sum hava brúk fyri hesun túri?

**Dupulttúrar**

At siglt verður minst tveir túrar aftur og fram hvønn dag í vikuni má verða ein sjálvfylgja, men hvat í harrans navni skulu suðringar brúka túrarnar mánatýs og mikudag kl. 10.00 úr Tórshavn til— fara norður og venda á keiðuni í Tórshavn?

Broyti fráferðurnar á hesum túrum til millum kl. 12 ella 14 úr Tórshavn, so hevði tað verði eitt sindur meira skil í ferðaætlanini.

At játtandi myndugleikarnir ikki vilja brúka 1/10 av einum prosenti av fíggjarætlanini til at betra ferðasambandið til Suðuroyar við, kunnu vit sum búleikast her suðri ikki góðtaka

# Gloyma fólkini á útoyggj

**Óla Jákup úr Dímun**



Hetta er heiti á grein í Oyggjatíðindi nr. 78 , fríggjadagin 30. november .

Fyrst er at siga, at pástandurin í hesi grein, um at tyrlan hjá Atlantsflog ikki røkir flúgvingina til útoyggjarnar til fulnar er púra burturvið og ógrundaður, fyri ikki at siga óndsinnaður.

Veruleikin er tann, at eg havi onga grund yvirhøvur at klaga um hesi viðurskifti.

Tí undrar tað meg nógv, at ein við at lesa hesa greinina fær tað fatan, at eg havi sagt meg vera ónøgdan við hesa tænastu. Havi heldur ikki verðið spurdur, um vit eru ónøgd.

Eg havi bert rós og tøkk at bera tyrlumanningini fyri góða tænastu og vælvild í samband við okkara ferðasamband, og fari at pástanda, at tað sama er galdandi fyri hinar útoyggjarnar.

# Aftursvar til »Skomm at føroyingar ikki duga at skriva føroyskt«

**Rúni Janusson**

Góða Hanna!

Eitt er at føroyingar hava trupulleikar við at seta ð'ið í rætt stað.

Í greinini hjá tær kemur orðið, "man" fyri fleiri ferðir. Hvørja ferð skrivar tú "mann". Tað fekk meg til at leita meira eftir "man" enn at finna útav hvar ð'ið eigur at vera.

Útmerkað grein annars, sum hevur ein góðan boðskap.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Lisbeth fingið tríggjar nevndarsessir

**Lisbeth L. Petersen skal sita í trimum nevndum í Fólkatinginum teirra millum 21-mannanevndini viðvíkjandi Føroyum. Høgni hevur ikki fingið nakran nevndarsess, men hann vil heldur ikki hava nakran**

FÓLKATINGI
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*



*Eitt tað fyrsta, nýggju fólkatingslimirnir skulu gera, er at skriva undir uppá, at teir vilja halda grundlógina. Hóast hann ikki virðir grundlógina sum galdandi í Føroyum, so hevur Høgni Hoydal einki ímóti at skriva undir uppá, at hann vil halda hana í sínum virki í Fólkatinginum*

Teir báðir føroysku fólkatingslimirnir eru nú farnir til verka niðri á Christiansborg. Fyrradagin skrivaðu Lisbeth L. Petersen, Høgni Hoydal og hinir 66 nývaldu fólkatingslimirnir undir uppá, at tey vilja halda og virða grundlógia, og eftir hetta vóru tey til reiðar at fara undir fólkatingsarbeiðið.

Røður skuldu skrivast til orðaskiftið um setanarrøðuna hjá Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra, sum var í allan gjár.

Føroysku fólkatingslimirnir skuldu ikki fáa orðið fyrrenn eftir náttturða, og vit vita tí ikki, hvør boðskapurin hjá teimum var. Lisbeth L. Petersen hevði á middegi í gjár framvegis ikki gjørt av, um hon fór at taka orðið, men eina røðu hevði hon i øllum førum skrivað. – So fáa vit at síggja, segði hon. Hjá Høgna Hoydal var hinvegin eingin ivi. Hann ætlaði upp á røðarapallin at tosa um sjálvstýristilgongdina í Føroyum.

### Nevndarsessirnir býttir

Hesir fyrstu dagarnir í Fólkatinginum hava gingið við at býta teir mongu sessirnar í nevndunum millum teir 179 limirnar.

Gravgangur er eftir at sleppa í tær týdningarmestu nevndirnar, og í so máta heldur Lisbeth L. Petersen, at hon hevur gjørt ein góðan fong. Hon er partur av fólkatingsbólkinum hjá stjórnarflokkinum Vinstra og hevur fingið sæti í trimum nevndum: 21-mannanevndini viðvíkjandi Føroyum, Politisk-Búskaparligu nevndini og Uttanríkisnevndini. Hetta býtið er hon vælnøgd við.

- Hetta eru tær nevndirnar, sum viðgera flestøll mál, sum hava við Føroyar at gera, og tí kann eg ikki vera annað enn vælnøgd, sigur hon.

Tað er serliga 21-mannanevndin viðvíkjandi Føroyum, sum er áhugaverd. Har verður øll sjálvstýristilgongdin viðgjørd og allar samráðingar millum landsstýrið og Føroyar. Politiskbúskaparliga nevndin hevur eisini havt nógv mál viðvíkjandi Føroyum á skránni, eitt nú bankamálið og loysnina á tí málinum.

### Høgni uttan sess

Høgni Hoydal situr hinvegin ikki í nakrari nevnd. Hann hevur frammanundan boðað frá, at hann ikki vil blanda seg upp í vanliga virksemið í Fólkatinginum, sum hevur við donsk viðurskifti at gera, og tí vil hann heldur vera heftur at nakrari nevnd.

Høgni Hoydal hevur gjørt tingbólk saman við grønlendsku fólkatingslimunum, Kuupik Kleist og Lars Emil Johansen, sum hinvegin einki hava ímóti at sita í fólkatingsnevndunum.

Kuupik Kleist hevur fingið ein sess í tí týdningarmiklu Uttanríkispolitisku nevndini, og Lars Emil Johansen hevur fingið ein sess í Verjunevndini. Uttanríkispolitiska nevndin er ikki tann sama sum Uttanríkisnevndin, har Lisbeth L. Petersen situr. I Uttanríkispolitisku nevndini verða øll bráðfeingis mál av stórum uttanríkispolitiskum týdningi viðgjørd. Tað snýr seg millum annað um danska hernaðarliga luttøku í Afghanistan. Thuleradarstøðin og verjuavtalurnar við USA, sum hava stóra áhugan hjá grønlendsku limunum kunnu eisini hugsast at verða viðgjørdar í hesari nevndini.

Hesum seinasta málinum fara grønlendsku fólkatingslimirnir helst at gera nógv burturúr í fólkatingsarbeiðinum hjá sær, og teir fara uttan iva at verða væl stuðlaðir av umboðnum hjá Tjóðveldisflokkinum. Enn er tað Høgni Hoydal, men í næstu viku tekur varamaðurin Torbjørn Jacobsen helst yvir.



*68 fólkatingslimir eru nývaldir, og her er tað Lisbeth L. Petersen, sum stendur fremst í røðini og skrivar undir uppá, at hon samvitskufult fer at halda grundlógina*